# Anna givin sum postboð

**Fríggjadagin 15. februar skipaði Postverk Føroya fyri móttøku í Nólsoy fyri Onnu Thomsen, sum hevur lagt frá sær sum postboð**

MÓTTØKA
*Myndir: Sámal Bláhamar*

Anna Thomsen í Nólsoy hevur nú lagt frá sær sum postboð í Nólsoy. Hóast hon alment hevur verið postboð í 33 ár, hevur hon fingist við postútbering síðan einaferð fyrst í 40-árunum. Pápi Onnu, Jens Hansen, var postboð í Nólsoy í samfull 44 ár, og maðurin, Høgni Thomsen, tók síðan yvir poststarvið.

Postverk Føroya skipaði fyri móttøku fríggjadagin. Ritan sigldi eykatúr til Nólsoyar í hesum sambandi, og umboð frá Postverkinum vóru við til hátíðaløtuna, sum var í Magnussarstovu, sum er eitt av allarelstu húsum í bygdini og barnaheimið hjá Onnu, har hon er født og uppvaksin.






*Hjúnini Høgni og Anna Thomsen hava havt við post at gjørt í eitt langt lív*

*Anna Thomsen er nú givin sum posboð í Nólsoy*



*Anna Thomsen saman við Hjørdis Viberg og Svanbjørg Manai, frá Postverki Føroya, uttan fyri posthúsið í Nólsoy*



*Við á móttøkuni vóru prestarnir Sonja Klein og Bjarni Bæk úr Havn*

## Tøkk

Eg takki so hjartaliga fyri blómur, fjarrit, gávur og telefonsamrøður, tá eg fylti 90 ár.

**Blíðar heilsanir**
**Axel Mortensen**

## Dagurin

20. februar. Eucharias, deyður á 788. Biskupur í Orleans, sum fyri fleiri undurgerðir varð skírdur halgimenni.

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri ta samkenslu, sum mær var víst, tá kæra mamma mín

**Emly Nolsøe**
Tvøroyri

doyði og fór til gravar.
Eg takki tykkum, sum vóru um hana ta seinastu tíðina og serliga tykkum – starvsfólkum á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Føroya Felag móti Krabbameini.
Eg takki tykkum øllum, sum hjálptu til við jarðarferðini, við bakstri og ervinum.
Eg takki presti, sangarum og berarum.
Takk fái tit, sum fylgdu mammu míni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Anfinn**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Karolina Samuelsen**
(Kalla)
Haldórsvík

doyði og varð jarðað.
Ein serstøk tøkk verður veitt tykkum á Mørkini og Sambýlinum í Kollafirði, at tit vóru so góð við hana og røktu hana so væl. Og til tykkum, sum so trúliga vitjaðu hana.
Tøkk fyri blómur og peningagávur til Mørkina.
Tøkk til Martin R. Jacobsen, prest, fyri vøkur og troystarrík orð á Mørkini. Tøkk til Marjuna Bæk, kirkju- tænarar, berarar, sangarar og tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Mikkjal, Kristian og Poul**